## Brasiliumenn gevast hjá B71



Heimasíðan hjá B71 skrivar, at tríggir av teimum fýra brasiliumonnunum, sum seinastu tvey árini hava spælt við B71, ikki koma aftur til Føroya. Tískil verður felagið uttan tríggjar av stuðulsleikararunum, nú farið verður undir uppgávuna at vinna sandoyingar aftur í Formula-deildina. Málslúkurin Clayton Soares heldur hinvegin fram á Sandi.

## Gango heldur fram í ÍF

Andras Gango hevur fyri tað mesta verið framúr í ÍF-málinum í ár, og tí er eyðsæð, at fuglfirðingar hava roynt at endurnýggjað sáttmálan við málverjan. Og hetta er nú eydnast, hóast tað hevur ljóðað, at okkurt av størru feløgunum eisini hevur ligið framvið eftir undirskriftini hjá ungverjanum. Við hesum er greitt, at málverjin hjá ÍF eisini eitur Andras Gango tey bæði komandi árini.

# Tjaldur til próvtøku

**Higar til hevur Stjørnan væl og virðiliga staðið VB og Neistanum kurl. Sunnudagin vitja tær hjá triðja avbjóðaranum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Kvinnurnar hjá Neistanum og VB hava seinnu árini verið tær, sum hava bjóðað Stjørnuni av. Leygardagin fæst at vita, hvat av teimum báðum er betur fyri í kapprenningini, sum nú eisini fevnir um Tjaldur*

Tjaldur hevur higar til verið fríska íkastið til kvinnu-kappingina í hondbólti.

Longu í fjør vístu tær tekin um, at nakað stórt var í væntu, tá tær vóru eitt mál frá at spæla seg í finaluna í steypakappingini, og í ár hava tær so væl og virðiliga prógvað, at hetta ikki var av tilvild.

Við javnleiki móti Neistanum og annars tryggum sigrum hevur Tjaldur eisini víst, at tær skulu takast fullkomuliga í álvara, og nú standa tær fyri størstu avbjóðingini, tá meistararnir úr Stjørnuni vitja.

Stjørnan hevur higar til prógvað, at tær heilt avgjørt ætla sær at stevna móti gullinum í ár. Ikki minst hevur talan verið um mest sum imponerandi tryggar sigrar móti VB og Neistanum, sum saman við Tjaldri verða mett sum liðini, ið skulu royna at standa meistarunum kurl.

### Spennandi í Havn

Tveir aðrir dystir – báðir í Havn – verða spældir um vikuskiftið, og á pappírinum er talan í báðum førum um sera javnar dystir.

Leygardagin tekur Neistin móti VB, og hesin dysturin líkist einum dysti um, hvør skal renna aftan á Stjørnuni og kanska eisini Tjaldri.

Sunnudagin er botndystur á skránni, tá Kyndil og StÍF takast. Hesi bæði liðini megnaðu í fjør at halda VÍF undir sær í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting. Í ár bendir alt á, at tað fyrst og fremst verða innan hýsis dystirnir millum Kyndil og StÍF, sum gera av, hvussu n iðurflytingarspurningurin sær út, og tí vilja báðir partar helst leggja nógv fyri sunnudagin.

## Mjølnir flytur dystir

Badmintonhøllin í Klaksvík er upptikin nú leygardagin, og tí verða nakrir dystir hjá Mjølni í Eik-ligunum fluttir. Menninir spæla móti Fleyr í Badmintonhøllini týskvøldið 4. november. Tað er fyrsti dysturin hjá monnunum í ár. Kvinnurnar spæla útidyst móti Drátti sunnudagin 2. november og mikukvøldið spæla tær móti Fleyr í Badmintonhøllini.

**-mørk**

## Spakin settur í við Tórsvøll

Mánadagin fer Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, at grava fyrsta spakan í byggingini av nýggjari fimleikahøll við Tórsvøll i Havn. Í Tórshavnar kommunu er tvey stór fimleikafeløg, Havnar Fimleikafelag og Fimleikafelagið Ljósið, ið leingi hava havt tørv á hallum. Fyrstu stigini til nýggju høllina varð tikið í 2004, og nú verður so fyrsti spakin settur í. Ætlandi stendur høllin liðug í 2009, og fer hon tá at kosta 56 milliónir krónur.

**-mørk**

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 85 | 58 | 27 | 6 |
| 2 Tjaldur | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 73 | 62 | 11 | 5 |
| 3 VB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 87 | 74 | 13 | 4 |
| 4 Neistin | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 75 | 71 | 4 | 3 |
| 5 StÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 90 | -23 | 0 |
| 6 Kyndil | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 51 | 83 | -32 | 0 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | | | | vunnin | tapt | sett | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | | t | sett | sett | munur | stig |
| 1 SÍ | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 2 Fleyr | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 3 Mjølnir | 3 | 2 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 4 |
| 4 Dráttur | 3 | 2 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 5 ÍF | 3 | 1 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 2 |
| 6 KÍF | 4 | 0 | - | 4 | 6 | 12 | -6 | 0 |
| 7 TB | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

# Sjónvarpið sendir úr Bosnia

**Til ber at fylgja við á skíggjanum, tá føroyska manslandsliðið í hondbólti spælir móti Bosnia í morgin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í 3-2 sendingini hjá Sjónvarpinum í gjárkvøldið kundi verturin staðfesta, at Sjónvarpið fer at senda beinleiðis, tá føroysku hondbóltsharrarnir í morgin skulu royna seg í Sarajevo.

Hóast heimaliðið her ikki kann fáa stuðul frá vanliga harðmæltu heimaáskoðarunum, so er eingin ivi um, at talan verður um stóran bita hjá okkara monnum, um enn hesin ikki verður heilt so stórur, sum hann var tað mikukvøldið móti Serbia.

Sendingin í Kringvarpinum byrjar klokkan 12.50.



*Tað verða neyvan 21 mál á muni hesaferð, men eingin ivi er um, at talan aftur nú verður um sera stóra avbjóðing hjá føroysku hondbóltsharrunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-deildin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 01.11 | 15.00 | Neistin-VB |
| 02.11 | 14.30 | Kyndil-StÍF |
| 02.11 | 15.00 | Tjaldur-Stjørnan |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 01.11 | 14.00 | ÍF-KÍF |
| 01.11 | 14.00 | Dráttur-TB |
| 02.11 | 13.00 | TB-KÍF |
| 02.11 | 14.00 | Dráttur-Mjølnir |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 02.11 | 14.00 | SÍ-ÍF |